## Michael Jackson jarðaður



Bretska blaðið Daily Mail skrivar, at Michael Jackson er jarðaður í Forest Lawn-kirkjugarðinum í Hollywood. Sambært blaðnum stúrir familjan fyri, at viðhaldsfólk hjá tí deyða fara at royna at grava hann uppaftur, og at tey umhugsa at flyta líkið, um almenningurin fær at vita, hvat Michael Jackson er jarðaður. Michael er jarðaður, men burtursæð frá familjuni og starvsfólkunum á kirkjugarðinum veit eingin, hvar hann liggur, sigur eitt starvsfólk á kirkjugarðinum við Daily Mail. Tað hevur leingi verið gitt, at Michael Jackson skuldi jarðast á garði sínum, Neverland.

## Ófriður í París

Í gjárkvøldi var ófriðarligt í Bobigny-býarpartinum í París, har ungfólk settu eld á ruskbingjur og bussskýli, samstundis sum tey hóttu løgreglumenninar við jarnrørum, skrivar AFP. Orsøkin til ófriðin var, at ein 18 ára gamal unglingi doyði, tá hann koyrdi undan løgregluni. Tann ungi maðurin sýtti fyri at steðga, tá løgreglan bað hann, og í royndini at sleppa undan løgregluni rendi hann á eina vegabyrging og doyði. Tilburðurin missir um ein líknandi tilburð í 2005, og ta ferðina endaði tað við ógvusligum samanbrestum millum ungfólk og løgregluna.

# 5% færri fiskidagar næsta ár



*Enn einaferð kunnu fiski-og útróðrarmenn vænta sær niðurskurðir í fiskidøgum – og hesaferð verður talan helst um 5% í øllum veiðibólkum, umframt aðrar veiðiásetingar á landgrunninum*
*Mynd: Karstin Vang*

**Nú vinnunevnd løgtingsins í morgin fer at leggja fram álit um fiskidagar fyri komandi fiskiár, bendir alt á, at niðurskurðurin í døgum verður 5%. Hetta skjóta samgonguumboðini í vinnunevndini upp. Aftrat hesum verða nýggjar økisfriðingar fyri trolveiði, umframt aðrar avmarkandi ásetingar um veiði á landgrunninum**

FISKIDAGAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í dag leggur vinnunevnd løgtingsins seinastu hon á sítt arbeiði um fiskidagar fyri næsta fiskiár, sum byrjar 1. september.

Forkvinnan í nevndini er Katrin Dahl Jakobsen, og hon var á veg á vinnunevndarfund, tá vit høvdu hana í telefonini í morgun.

### 5% niðurskurður

Einki bendir á, at tað verður ein samd vinnunevnd, sum leggur fram álit í morgin.

- Eg vænti, at meirilutin í nevndini, sum er umboðini fyri samgonguflokkarnar, fer at fylgja uppskotinum hjá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, Jacobi Vestergaard, tó við nøkrum viðmerkingum um fiskiveiðiskipanina.

Katrin Dahl Jakobsen væntar ikki, at semja fæst um eitt álit, men vísir á, at umboðini hjá stóra andstøðuflokkinum Tjóðveldi væntandi fara at halda seg til tilmælið hjá Havstovuni um 50% skerjing av fiskidøgum hjá skipum og bátum, sum fiska tosk og hýsu og 20% skerjing av upsaveiðini við troli.

- Útgangsstøðið hjá landsstýrismanninum var, at ongar skerjingar skuldu vera í fiskidøgum fyri komandi fiskiár, men í sínum uppskoti til løgtingið skeyt hann tó upp, at fiskidagarnir í øllum bólkum skulu skerjast við 5%, samstundis sum hann mælti til ávísar økisfriðingar fyri trolveiði. Uppskotnu friðingarnar eru í ein útnyrðing úr Mykinesi og í ein landnyrðing úr Fugloyarbankanum – í báðum føri er talan um friðingar, sum skulu verja smáan upsa og smáfisk annars.



*- Vinnan hevur ikki skyld í, at neyðugt hevur verið við tillagingum av fiskidøgum seinastu árini, sigur Katrin Dahl Jakobsen, forkvinna í vinnunevnd løgtingsins*

Katrin sigur, at sambært uppskotinum hjá landsstýrismanninum halda friðingarnar av Føroyabanka fram, samstundis sum vinnulig fiskiveiða ikki verður loyvd nærri enn ein fjórðing úr landi – fyribils í eitt ár.

- Eisini skulu línuskip, sum áður høvdu loyvi at veiða inn á 6 fjórðingar úr landi, nú út um 7,5 fjórðingar. Aftrat hesum skulu meskarnir í hjáveiðiposanum hjá trolbátum, sum royna á landleiðini, veksast úr 180 mm. upp í 250 mm.

Sum skilst á forkvinnuni í vinnunevnd løgtingsins, fer meirilutin í nevndini at mæla løgtinginum til at samtykkja hesar broytingar, sum landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum hevur skotið upp fyri løgtinginum.

### Ótryggleiki

Katrin Dahl Olsen skilir væl, at føroyski fiskiskipaflotin, sum er undir fiskidagaskipanini, seinastu árini hevur kent ein ótryggleika, tí fyritreytirnar undir teirra vinnu alla tíðina vera broyttar.

Hetta fer meirilutin vinnunevndini eisini at gera sínar viðmerkingar til í álitinum til løgtingið.

- Vinnupolitiskt eru nógvar broytingar gjørdar í fiskiveiðiskipanini, sum á ymiskan hátt hava ávirkað grundarlagið undir skipanini – og grundarlagið hjá okkara fiskiskipaflota. Vinnan sjálv hevur ikki skyld í hesum, og hon hevur krav upp á at vita, hvørjar fyritreytirnar eru upp á longri sikt.

Forkvinnan í vinnunevndini heldur, at skipa-og útróðrarflotin, sum er undir fiskidagaskipanini, ikki framhaldandi skal noyðast at liva í hesi óvissu og hesum ótryggleika um, hvussu grundarlagið nú sær út, tá fiskidagar skulu ásetast einaferð um árið.

### Eftirmeting

- Vit mugu bara ásanna, sigur Katrin Dahl Jakobsen, at nógvar broytingar eru gjørdar í hesi skipan, sum á ymiskan hátt hava ávirkað veiði og veiðitrýst. Eg haldi tí, at Havstova, vinna og fiskivinnuumsiting áttu at sett seg niður saman og hugt upp á, hvussu fiskiflotin sær út í mun til, tá fiskidagaskipanin varð sett í verk. Tá hevði eisini verið høvi at hugt upp á útrokn-